## DAGSINS MEINING

# Samstarv við Grønland

Løgmaður hevur undir síni vitjan í Grønlandi nýtt høvið til at taka upp nøkur mál í fiskivinnuavtaluni millum Føroyar og Grønland. Talan er fyrst og fremst um møguleikan hjá føroyskum reiðarafyritøkum at keypa ónýttar rækjukvotur í grønlendskum sjógvi. Hetta er bæði skilagott og rætt, og hetta fær mong at hugsa um spurningin, hví vit ikki samstarva meira við Grønland.

Íslendingar og norðmenn samstarva nógv við Grønland. Hetta samstarv er á fleiri økjum t.d. útbygging av undirstøðukervi, ferðavinnu, fiskivinnu, útbúgving og KT. Hví hava vit ikki størri samstarv innan t.d. fiskivinnu, gransking og KT, kundu vit havt hug at spurt. Føroyingar hava langa siðvenju fyri at virka í Grønlandi og kenna landið væl. Her áttu at verið samstarvsøki, sum báðar tjóðir kundu fingið gagn av.

Tað verður talað og skrivað nógv um samstarv í útnorði. Vit hava eitt politiskt útnorðursráð, sum skal tryggja politiska samstarvið í útnorði. Hvat ger Útnorðursráðið spyrja mong. Hvørji stig hevur hetta ráð tikið til tess at menna vinnuliga og mentanarliga samstarvið millum t.d. Grønland og Føroyar? Hvørji stig ætlar hetta ráð at taka? Hvat hugsa føroysku ráðslimirnar um samstarvið og hvussu hugsa teir sær, at samstarvið skal økjast og mennast framyvir? Eitt áhugavert politiskt samstarv er norðuratlantsbólkurin á fólkatingi. Men hesin bólkur tykist ikki at fara at menna seg til at vera tann stovnurin, sum tryggjar eitt størri og breiðari politiskt og búskaparligt samstarv millum Grønland og Føroyar.

Nú rennur alt meira og meira saman í Europa. Vit í útnorði eru uttan fyri hesa politiska tilgongd. Tað er okkara val, og soleiðis má tað vera, soleingi fiskivinnupolitkkurin hjá ES beinleiðis er til skaða fyri útrorður, sum ein grønlendskur politikkari tók til í útvarpinum í gjár. Vit kundu hugsað okkum at lagt afturat, at finna vit ikki saman í eitt nógv tættari politiskt og búskaparligt samstarv í útnroðri, so er vandi fyri at útnorður endar sum ein tilafturskomin útjaðari í Europa. Her er tørvur á dialogi og góðum hugskotum. Eitt hugskot kundi verið, at sent ein føroyska sendinevnd við politikkarum og vinnulívsfólki á vitjan hjá grannatjóðunum í útnorði til tess at kanna møguleikarnar fyir øktum samstarvi. Í hesum høpi er ferðasambandi altavgerandi. Ber tað veruliga ikki til á politiskan hátt át økja um ferðasambandið og samstundis gera tað bíligari? Her eru ivaleyst møguleikar, tað ræður um at troyta teir.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Gomul og sjúk seta sjúkrarøktarfrøðing í hálsin

**Jón Ellendersen**



»Navnið Landsverkfrøðingurin er eisini eitt langt og tungt navn og riggar ikki so væl í útlendskum høpi« stendur á heimasíðuni hjá Landsverki sum ein av grundgevingunum fyri, at navnið er broytt frá Landsverkfrøðinginum til Landsverk. Í hesum samanhangi nevndi onkur, at var Landsverkfrøðingurin tungt, hvussu er so hjá álvarsliga sjúkum og gomlum, sum liggja á Landssjúkrahúsinum?

»Kann eg sleppa at tosa við ein sjúkrarøktarfrøðing?«

Nei, neyvan, tí komin hálva leið í orðinum, orka tey neyvan longur ella, so fløkjast tey í orðinum. Men tað sum verður roknað tungt fyri útlendingar, verður, sum tað sær út, helst roknað sum peanuts fyri álvarsliga sjúk og gomul.

Neyvan finst nakað tyngri orð, hugsað vit um høpið, orðið verður nýtt í, og higartil havi eg ikki hoyrt nakran vanligan føroying nýtt orðið. Sjúkrasystir ella sjúkrapleyirska verður nýtt, og grundgevingin er altíð hin sama: Orðið er ov tvørligt og tungt.

Í fleiri førum hevur eydnast at finna orð, sum bæði liggja væl í munninum, eru løtt at siga og minnast, og fella náttúrlig. Dømi eru td. tyrla, telda, hvirla, fløga, rennifjøl og prutl. Sjálvur havi eg eitt starvsheiti, sum tey flestu seta í hálsin: nervanámsfrøðingur, og hvørja ferð eg nýti tað, spyrja fólk hvat í víðu verð tað er. Sigi eg hinvegin danska heitið, neuropædagog, so vita tey kanska ikki hvat tað inniber, men eina ábending fáa tey hóast alt.

Men sjúkrarøktarfrøðingur!?!?

Verfaðir segði skemtandi í hesum sambandi, at nú var hann ikki longur skipstimbrari, men skiparøktarfrøðingur, og heilt skeivur fór hann ikki, tí tað er eins láturligt sum sjúkrarøktarfrøðingur.

Vónandi slær sama hugsan ígjøgnum á Landssjúkrahúsinum, sum at enda hevur nátt klóku høvdini hjá Landsverki og Fróðskaparsetrinum so vit sleppa undan hasum ónýtiliga og tvørliga orði.

Hvussu tað so skal eita: Sjúkrasystir og sjúkrabeiggi vóru hóast alt góð orð, hóast tað seinna ljóðar eitt sindur barnsligt. Men hvussu við sjúkrarøktari? Tað samsvarar væl við tað danska sygeplejerske og tað svenska sjukskjøterska.

Mín áheitan til okkara mangan gløggu orðasmiðir er, at teir eisini hugsa hvørjum høpi orðini verða nýtt í og hvørji tey eru, sum kunnu hava stórar trupulleikar við orðinum.

Eitt er í øllum føri víst: Orðið sjúkrarøktarfrøðingur fer ongatíð at finna frama millum manna, og hvussu so enn summi royna at nýta tað á skrivt, so verða sjúkrasystir ella sjúkrapleyirska nýtt av 99% av fólkinum. Og tá er bert eftir at spyrja: Hvat skulu vit við einum orði, sum eingin nýtir?

# Útlendsk ítróttafólk í Føroyum

**Opið bræv til Jógvan við Keldu, Innlendismálaráðharra**

**Heðin Mortensen, forseti og Sølvi Reinert Hansen, Ítróttaráðgevi**
*Ítróttasamband Føroya*

Ítróttasamband Føroya hevur í skrivi frá Løgmanni dagfest 27. mei, sum svar uppá teldupost frá ÍSF dagfestur 13. apríl, fingið at vita, at samgongan hevur avgjørt »at seta ein politiskan fylgibólk at viðgera útlendingaøkið yvirhøvur«.

Ítróttasamband Føroya vil við hesum spyrja, um fylgibólkurin er farin í gongd, og um Ítróttasamband Føroya verður tikið uppá ráð, tá avtalan við danir viðvíkjandi útlendskum ítróttafólkum í Føroyum verður gjørd.

Sum løgmaður vísir á í brævinum, hevur landsstýrismaðurin onga formella skyldu »at fylgja tilella frámælum hjá einum áhugabólki«. Men tað er hugstoytt hjá ítróttinum, at politiski myndugleikin kortini heldur seg hava rætt at gera eina seravtalu vegna Ítróttasamband Føroya, ið sambært evstulóg síni er »óheft av politiskum og átrúnaligum áhugamálum«.

Ítróttasamband Føroya vil tí enn einaferð minna landsstýrismannin á, at sjálvbodna virksemið í ítróttafeløgunum kring landið er sera viðkvæmt. Feløgini verða rikin av ítróttarleiðarum, ið einans virka av áhuga. Um landsins myndugleikar ikki vísa skynsemi í hesum máli, kunnu teir forkoma stórum parti av virkseminum í ítróttafeløgunum. Tí meta vit, at landsstýrið hevur eina »moralska« skyldu at verja og fjálga um sjálvbodnu ítróttafeløgini, heldur enn at áleggja teimum fleiri byrðar.

Heystið nærkast skjótt, tá Hondbóturin og Flogbólturin fara í gongd aftur. Ítróttasamband Føroya vil heita á landsstýrismannin í Innlendismálum at fáa greitt hetta málið skjótast gjørligt, so feløg innan hesar ítróttagreinar ikki enda í somu støðu sum fótbóltsfeløgini undan hesum kappingarárinum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Toskurin kann goymast í havinum, men ikki føðin

**Petur Steingrund,**
*Fiskirannsóknarstovan*



Íslendski fiskifrøðingurin Jón Kristjánsson hevur ofta ført fram, at toskur »goymist ikki«. Hetta er beinleiðis skeivt, men í staðin er tað føðin hjá fiskinum, sum ikki goymist.

**Toskastovnurin kundi verið størri enn nú**
Í sjeytiárunum lá toskastovnurin undir Føroyum millum 80 og 160 túsund tons, meðan hann seinastu fimm árini bert hevur verið millum 65 og 120 túsund tons. Hyggja vit eftir øðrum toskastovnum í Norðuratlantshavi eru flestu teirra nógv minni, enn teir einaferð vóru. Hetta vísir, at toskur væl kann goymast í havinum.

**Royndin eftir toski er økt**
Jón Kristjánsson sigur orsøkina vera, at royndin eftir toski var nógv størri fyrr enn nú, hóast hann ongar kanningar hevur at halda seg til. Hann letur eyguni fullkomuliga aftur fyri teimum framstigum, sum hava verið í veiðitøkni seinastu nógvu árini. Kanningar vísa, at fyri flestu toskastovnar er veiðitrýstið størri nú enn fyrr. At Jón Kristjánsson beinleiðis sigur ósatt er harmiligt og tænir ikki nøkrum endamáli um upplýsing fyri fólk.

**Ikki er møguligt at goyma føðina**
Toskur kann goymast í havinum í nøkur ár, men ikki føðin hjá toskinum. Við at troyta toskastovnin hart, megnar toskurin ikki at troyta føðina til fulnar. Føði so sum nebbasild goymist ikki, tí hon er longu deyð ella etin av øðrum fiski eftir stuttari tíð (ofta minni enn eitt ár). At halda toskastovninum niðri er tað sama sum at dríva óskynsama stovnsrøkt av t.d. nebbasild og hvítingsbróðri. Tey annaðhvørt doyggja ella verða etin av øðrum.

# Toskurin má sleppa at gagnnýta føðina í havinum

**Petur Steingrund**
*Fiskirannsóknarstovan*

Jón Kristjánsson hevur aftur verið í Føroyum og sagt, at tað er bara at fiska nógv, tí fiskurin er rak og manglar føði. Vinnan hevur tikið væl ímóti hesum boðskapi, men er hann rættur? Tað kann væl hugsast, at vinnan fær minni burtúr, um hesi ráð verða fylgd.

**Ov fáir toskar í góðum tíðum**
Gróðrarlíkindini í havinum hava verið heldur vánalig seinastu tvey árini og fiskurin er rak. Jón Kristjánsson sigur, at so er bara at tynna út, soleiðis at livilíkindini verða fín hjá teimum fiskum, sum eru eftir. Men hvat so tá gróðrarlíkindini í havinum gerast góð? Tá eru ov fáir toskar til at gagnnýta yvirflóðina av føði. Ein toskur kann ikki vera allar staðir í senn og eta. Føðin fer heldur til onnur fiskasløg og aðrar verður í havinum. Veiðan av toski gerst minni, enn hon kundi verið.

**Ov fáir stórir toskar til tey ytru økini**
Tá grunnarnir vera harðliga troyttir, er toskurin smáur. Hesir smáu toskar eru bert á innaru leiðunum og eta krabbardjór og nebbasild. Toskurin er harvið avmarkaður til tær innaru leiðirnar og kann ikki gera brúk av føðini, sum er longur útiá. Har er ofta nógv til av hvítingsbróðri og svartkjafti, men teir hava einki at óttast, tí toskurin er so lítil, at hann er eingin hóttan. Hvítingsbróðir og svartkjaftur kunnu tí kenna seg tryggar fyri toskinum á uttaru leiðunum. Í staðin eru tað onnur fiskasløg og skapningar í havinum, sum gera sær dælt av hesari føði. Veiðan av toski verður minni, enn hon kundi verið.

**Lítið kemur burturúr við høgum veiðitrýsti**
Plantugróðurin í havinum setir mørk fyri, hvussu nógv føði verður til fiskin. Um veiðitrýstið er stórt, fer hendan føðin til smáan fisk. Um veiðitrýstið er minni, kemur tað sama (ella meira) upp á land, men fiskurin er størri. Fiskimenninir kundu oftari sitið heima í frið og náðum og kortini fingið líka nógv tons upp á land. Eisini er stórur fiskur skjótari at hagreiða og prísurin er betri.

# Fróðskaparsetrið mennir føroyskan førleika

**Mikudagin 23. juni kl. 15 fáa tríggir verkfrøðingar handað BS prógv á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Talan er um tveir oljufrøðingar og ein elektroverkfrøðing**

**ÚTBÚGVING**
*Tíðindaskriv*

Verkfrøðingaútbúgvingarnar á Fróðskaparsetrinum eru liður í miðvísu menningarætlanini hjá Fróðskaparsetrinum at menna og betra føroyskan førleika. Við verkfrøðingaútbúgvingini frá Fróðskaparsetrinum hava studentarnir ognað sær góða fakliga barlast at taka við avbjóðingum í m.a. føroyskari vinnu tey komandi árini.

### Oljuverkfrøði

Útbúgvingin í oljuverkfrøði er eitt beinleiðis úrslit av at Føroyar stigu um gáttina til oljuvinnuna. Almenn tilmæli um útbúgvingar finnast m.a. í álitunum »Frágreiðing til landsstýrismannin í skúlamálum frá útbúgvingarnevndini innan oljuvinnu« frá januar 1996 og til »Fyrireikingar til oljuleiting, Frágreiðing frá Oljuráðleggingarnevnd landsstýrisins« frá juli 1997. Í ár er aðru ferð, at Fróðskaparsetrið handar kolvetnisverkfrøðingum prógv. Útbúgvingin fevnir m.a. um jarðfrøði, boritøkni, brunntøkni, seismikk, veskumekanikk og kolvetnisalisfrøði.

### Elektroverkfrøði

Útbúgvingin til elektroverkfrøðing hevur verið í gongd síðan fyrst í 1990-unum, og hon fevnir m.a. um framleiðslu og tænastuvirksemi í samfelagnum og í vinnulívinum. Dentur verður lagdur á evni sum viðvíkja bæði traditionellum og aktuellum evnum. T.d. kunnu nevnast datasavning og dataviðgerð, signalviðgerð, stýritøkni og fjarskifti. Hetta eru týðandi tættir í eitt nú el-orkuskipanum, skipanum í fiski- og alivinnu og í kolvetnis- og KT-vinnu.

### Nýggju verkfrøðingarnir

Nýggju oljuverkfrøðingarnir eru Heðin Abrahamsen og Halgir Arge, sum hava skrivað BS-ritgerð í felag um alisfrøðiligar parametrar í føroyskum basalti við støði í kjarnuboringini frá Vestmanna í 1980. Teir hava m.a. kannað porøsitet, permeabilitet og leidningsevni í føroyska basaltinum. Teir hava gjørt verkætlanina í samstarvi við GEUS í Danmark, har teir fingu vegleiðing og atgongd til starvsstovu at gera mátingarnar.

Nýggi elektroverkfrøðingurin er Viggo Johansen. Í BS-ritgerðini hevur hann kannað støði fyri at uppbyggja eina nýggja fartelefonskipan í Føroyum. Talan er um triðja generatións breiðbands fartelefonskipan, ið nevnist UMTS. Hann hevur serstakliga kanna útbreiðsluviðurskiftini í innan- og uttandura umhvørvi, og samanborið við GSM skipanina. Breiðbandsskipanir sum UMTS eru av serligum týdningi fyri at menna fjarskiftisskipanir við atliti at kunningartøkni í vinnulívinum og í samfelagnum annars.

# Fjarferðing í Føroyum

**Dennis Holm**
*samfelagsfrøðingur, Granskingardepilin fyri Økismenning*

**Arbeiðsrit 8/2004**
Í teimum framkomnu ídnaðarsamfeløgunum er tað vorðið alsamt meiri vanligt at ferðast langa leið millum bústað og arbeiðspláss – at fjarferðast/pendla millum bústað og arbeiðspláss. Í pørtum av Føroyum er fjarferðing eisini vorðin ein natúrligur partur av gerandisdegnum. Hetta ikki minst orsaka av framhaldandi útbygging av føroyska vegakervinum, sum í dag ger tað møguligt hjá umleið 75% av fólkinum at koyra í túni hjá hvørjum øðrum – tá Norðoyartunnilin hava 85% av føroyingunum hendan møguleika.

Økta fjarferðingin hevur ført við sær, at summar føroyskar kommunur í dag kunnu sigast bera eyðkenni av at vera bústaðarkommunur. Hetta arbeiðsrit viðgerð tvær tílíkar kommunur, Hósvíkar og Kvívíkar kommunur. Galdandi fyri bæði Hósvíkar og Kvívíkar kommunur er, at stórur partur av fólkinum í arbeiðsførum aldri fjarferðast til arbeiðis uttanfyri kommunumark, í flestu førum til arbeiðis í Havn. Eisini er galdandi fyri báðar kommunur, at nógv fólk seinastu árini eru flutt higar og fjarferðast til arbeiðis uttanfyri kommunumark.

At nógv fjarferðast til arbeiðis í Havnini er sum so ikki so løgi, tí Høvuðsstaðarøkið (umframt Runavíkar og partvíst eisini Klaksvíkarøkið) er tann parturin av landinum, sum hevur hava havt størstu búskaparligu framgongdina seinastu árini. Har eru eisini flest arbeiðstilboð fyri fólk við hægri útbúgving, umframt nógv arbeiðstilboð innan tænastu- og handilsvinnuna. Tann stóri búskaparvøksturin í Havn hevur tó eisini ført við sær økt trýst á bústaðarmarknaðin og harvið hægri húsaprísir og leigukostnað. Harumframt eru bíðilisti á barnaansingarøkinum, og eisini er tørvur á útbyggingum á skúlaøkinum. Hesi viðurskifti ávirkað, tá fólk skulu gera av, hvar tey skulu seta búgv. Kanningin vísir eisini, at fyri fólk, sum hava valt at seta búgv í Hósvík og Kvívík seinastu árini, hevur tað havt týdning, at bústaðurin er bíligari enn í Havn og at nærumhvørvið er barnavinarligt.

Arbeiðsritið viðgerð eisini í hvønn mun tað ávirkar lokalsamfelagið sosialt, at stórur partar av fólkinum í arbeiðsførum aldri fjarferðast til arbeiðis aðrastaðni. Kanningar í eitt nú Onglandi og Írlandi vísa, at eitt høgt tal av fjarferðum (pendlarum) kann hava stóra negativa ávirkan á sosialu samansjóðingina av lokalsamfelagnum. Kanningar í Hósvík og Kvívík vísa, at hetta ikki er galdandi í hesum kommunum.

At enda viðgerð Arbeiðsritið eisini í hvønn mun Hósvíkar og Kvívíkar kommunur raðfesta tað, at skapa eitt gott bústaðarumhvørvið. Í mun til menningarætlaninar hjá eini vanligar føroyskari kommunu í 1970-unum og 1980unum, har stórur dentur varð lagdur á at hava eitt sterkt lokalt vinnulív, so tykjast Hósvíkar og Kvívíkar kommuna í dag í stóran mun leggja dent á at skapa eitt gott bústaðarumhvørvið, og á tann hátt draga fólk til sín.

Arbeiðsritið kann takast niður á heimasíðuni hjá Granskingardeplinum fyri Økismenning:
www.region.fo
og fæst eisini í prentaðum líki við at venda sær til Granskingardepilin fyri Økismenning.

